LM-099/2023

Fylgiskjal 39

TAKS

UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ
TINGANES
POSTBOX 377
110 TÓRSHAVN
Føroyar

Dagfest: 22. februar 2024
J. nr.: 24/03703-2
P-tal/V-tal: 463418
Titt skriv:

Viðmerkingar til lógaruppskot um ferðavinnulóg
TAKS hevur gjøgnumgingið uppskotið og hevur fylgjandi tilmæli.

1. Ábyrgd
Sambært § 13, stk. 3, í uppskotinum um ferðavinnulóg er ætlanin at krevja inn náttúrugjald, og at gjaldið skal krevjast inn saman við ferðagjaldinum sambært løgtingslóg um ferðagjald. Løgtingslóg um ferðagjald áleggur longu TAKS at tryggja, at flutningsfyritøkur krevja inn áløgd ferðagjøld og rinda landskassanum tey. TAKS skilur tí § 13, stk. 3, í uppskotinum um ferðavinnulóg soleiðis, at TAKS skal hava líknandi leiklut við náttúrugjaldinum sum við ferðagjaldinum.

Sambært § 1, stk. 2, í løgtingslóg um ferðagjald eru tað flutningsfyritøkurnar, sum standa til svars fyri, at ferðagjaldið verður goldið. Lógaruppskotið ásetir ikki samsvarandi, men tað hevði verið skynsamt, um tað gjørdi tað. Tí verður av skeivt kravt inn, kann TAKS fyrihalda seg til einstaka fyritøku heldur enn til hópin av ferðafólki. Hetta hóvar eisini saman við, at tað eru flutningsfyritøkurnar, sum í fyrstu atløgu skulu tryggja, at gjaldið verður kravt inn. Tískil mælir TAKS til, at flutningsfyritøkurnar skulu standa til svars fyri, at náttúrugjaldið verður goldið, eins og tær longu gera við ferðagjaldinum. Fyri cruise-skip møguliga umboð teirra.

2. Hugtakið ferðafólk
Sambært § 13, stk. 1, í uppskotinum um ferðavinnulóg skal náttúrugjaldið rindast av øllum ferðafólkum, sum eru 16 ár og eldri og koma til Føroya.

Lógaruppskotið útgreinar ikki hugtakið ferðafólk. Eftir løgtingslóg um ferðagjald, verður hugtakið tulkað sum øll ferðandi, eisini føroyingar, men tað framgongur ikki, um henda tulking eisini skal galda fyri náttúrugjaldið. Hvussu hugtakið ferðafólk skal skiljast, hevur grundleggjandi týdning fyri, hvør hevur skyldu til at rinda náttúrugjaldið. TAKS mælir tí til, at lógaruppskotið allýsir hugtakið ferðafólk ella aðramáta nágreinar gjaldsskylduna.

3. Ásetingar um undantøk
Undantikin at rinda ferðaavgjald eru í verandi løtu loftvegis ferðandi undir 12 ár, sjóvegis ferðandi undir 16 ár, ferðandi í transitt og ferðandi í fari, ið ikki vanliga verður nýtt til ferðafólkaflutning. Undantikin at rinda náttúrugjald eru einans ferðandi undir 16 ár. Lógaruppskotið ásetir tó eisini, at § 3, stk. 1, nr. 2, í løgtingslóg um ferðagjald, t.e. ferðandi í transitt, ikki verður galdandi fyri ferðafólk við cruise-skipum.

Samanumtikið fara ferðandi millum 12 og 16 at rinda náttúrugjald, men ikki ferðagjald, um tey koma loftvegis, og ferðandi í fari, ið ikki vanliga verður nýtt til ferðafólkaflutning, fara

Postboks 2151
110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel 35 26 00
taks@taks.fo
www.taks.fo

somuleiðis at rinda náttúrugjald, men ikki ferðagjald. Sama fara transittferðandi, sum ikki eru við cruise-skipi. Fyrisitingarliga hevði dugur verið í at einfaldað hesar ásetingar.

Sama er at siga um ætlanina, at náttúrugjaldið skal áleggjast við komu til Føroya, har sum ferðagjaldið verður álagt við fráferð úr Føroyum, hetta sambært ávikavist § 13, stk. 1, í uppskotinum um ferðavinnulóg og § 1, stk. 1, í løgtingslóg um ferðagjald. TAKS mælir her til, at náttúrugjaldið verður álagt við fráferð heldur enn við komu, eins og ferðagjaldið.

4. Innkrevjing
Tað tykist í uppskotinum um ferðavinnulóg ógreitt, um ætlanin er, at TAKS skal krevja náttúrugjald frá eitt nú ferðandi, sum koma við stuttleikafari, privatum flogfari ella øðrum fari, sum ikki vanliga verður nýtt til ferðafólkaflutning. TAKS nýtir tó høvið til at vísa á, at umsitingin av hesum kann gerast heldur fløkjalig, um TAKS eitt nú skal standa til reiðar at krevja inn allastaðni, har ið einstaklingar koma til landið við stuttleikafari.

Sum nevnt omanfyri mælir TAKS til at allýsa hugtakið ferðafólk í uppskotinum um ferðavinnulóg ella aðramáta at nágreina gjaldsskylduna. Í miðlunum hevur verið frammi, at ætlanin er, at einans útlendsk ferðafólk skulu rinda náttúrugjald. Um so er, metir TAKS, at innkrevjingin av náttúrugjaldinum kann gerast munandi torgreiddari enn innkrevjingin av ferðagjaldinum, tí skiljast skal millum útlendingar og herbúgvandi.

Hetta er ein avbjóðing, sum flutningsfyritøkurnar mugu taka støðu til, men um innkrevjingin gerst torgreiddari, kann tað eisini merkja, at eftirlitið við innkrevjingini gerst samsvarandi verri at útinna.

TAKS mælir til, at omanfyrinevndu viðurskifti verða greidd.

5. Leiklutur stovnsins og heimildir
TAKS mælir til, at lógaruppskotið útgreinar leiklut stovnsins og heimildir (eitt nú til at fáa atgongd til roknskapartilfar og brævasamskifti), hvønn náttúrugjaldgjaldið skal rindast til, og møguleikan fyri panting.

6. Umsiting av útlutan
Tað skilst ikki á lógaruppskotinum, hvør myndugleiki skal umsita útlutanina sambært § 14 í lógaruppskotinum. Um tað er TAKS, fer tað at fáa umsitingarligar avleiðingar fyri stovnin. Er tað ikki TAKS, vil stovnurin árliga og uttan at biðið verður um tað fáa upplýst, hvør jarðareigari og jarðarbrúkari móttekur pening, tí hetta verður at rokna sum skattskyldig inntøka.

TAKS mælir til, at omanfyrinevndu viðurskifti verða greidd.

Vinarliga

Rani Johansen
Fulltrúi

Postboks 2151
110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel 35 26 00
taks@taks.fo
www.taks.fo